# Eg lovi at...

NÝGGJÁRSLYFTIR

*Lagt til rættis:*
*Rúnar Reistrup*

Ársskiftið er tíðin har bæði verður litið frameftir og aftureftir ísenn - eitt ár hvønn vegin, og verður tí av nógvum nýtt sum tíðin, tá stungið verður út í kortið hvat dentur skal leggjast á í næstu framtíð.

Útfrá royndunum og upplivingunum frá brátt farna ári í afturlítandi klárskygni ber til at seta sær mál frameftir. Hvat skal broytast og hvat skal halda fram sum tað er.

Vit hava bjóðað nøkrum av almennu persónunum í landinum at koma við sínum nýggjárslyfti til Føroya fólk.

Lyftir eru í sær sjálvum bindandi fyri tann, ið givið hevur lyftið. Og vóru tað ikki øll, ið høvdu hug at gera nýggjárslyftir, og onnur hildu tað era best at halda lyftini fyri seg sjálvan

Men nøkur hættaðu sær kortini at lova, og vit prenta her teirra lyftir fyri komandi árið.

**Jenis av Rana, tingmaður og formaður Miðfloksins:**

## Lovar at halda seg nærri Gudi

Besta lyfti, eg kann geva Føroya fólki fyri nýggja árið, er at lova at halda meg nærri Gudi. Hann er jú ráðgevarin fram um allar, Hann heldur øllum í sterku hond sínari, Hann hevur alt vald, kemur øllum til hjálpar, sum kalla á Hann og Hann hevur síðsta og avgerðandi orðið í øllum viðurskiftum lívsins. Vit hava m.a. hetta lyftið( í brævi Jákups): haldið tykkum nær til Gud, so skal Hann halda seg nær tykkum. Og so lovar hann eisini, at tann, ið setur álit sítt á Harran, verður ikki til skammar!

So betri lyfti enn at halda seg nær Honum kann ikki gevast.. Og tað verður eisini ráð mítt til hvønn eistakan føroying viðvíkjandi nýggja árinum - halt teg nærri Honum, sum elskar teg, sum virðismetir teg, sum bíðar eftir tær og sum ynskir at stýra dagliga degi tínum.

**Torleif Sigurðsson,
formaður fyri Fótbóltsamband Føroya**

## Lovar at virka fyri áhugarbeiðinum innan fótbólt

Føroyskur fótbóltur hevur á øllum økjum seinastu 10 árini verið í stórari menning. Avbjóðingarnar hava verið stórar og spennandi. Vit hava fingið fleiri yrkisleikarar.

Alt gott um hetta at siga, men latum okkum ikki gloyma, at tað berandi og tað sum hevur skapt henda møguleika, er tað megnar arbeiði, ið gjørt verður runt um í okkara feløgum. Tey fíggjarligu krøvini gerast tyngri og tyngri...

Mín vón skal vera, at vit duga hóvsemi, og at persónlig fíggjarlig girnd ikki skal skaða okkara best umtóktu ítróttargrein. Men at vit eisini í framtíðini standa saman sum ein maður. Soleiðis at vit um 10 ár kunnu ásanna, at vit eru komin enn longur á leið.

Hesum vil eg virka fyri.

**Edmund Joensen,
tingmaður og formaður Sambandsfloksins:**

## Lovar at at arbeiða ímóti loysingarætlanini hjá landsstýrinum

Sosialurin hevur heitt á meg, um at orða eitt nýggjárslyfti, sum er viðkomandi fyri føroya fólk. Tað vil eg fegin gera.

Sambandsflokkurin fer í 2001, framhaldandi at arbeiða hært fyri at varðveita tey rættindi, frælsi og fríheit, sum ríkisfelagsskapurin gevur:

- vit skulu framhaldandi hava ríkisborgararættindi í øllum ríkinum
- verandi rættur til hægri útbúgvingar skal ikki takast frá føroyska ungdóminum
- rætturin til sjúkraviðgerð uttanlanda, skal varðveitast
- tey veiku í samfelagnum skulu hava trygg kor
- vælferðarsamfelagið skal mennast og varðveitast
- Føroyar skulu framhaldandi gerast meira sjálvbjargnar
- komandi ættarlið skulu hava fjølbroyttar møguleikar í altjóða høpi
- og vit skulu skapa vinnulívinum kappingarførar karmar, bæði her heima og í altjóða høpi.

Hesum fara vit at arbeiða fyri í 2001. Tí fer Sambandsflokkurin eisini í komandi ári at arbeiða ímóti loysingarætlanini hjá landsstýrinum.

**Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins**

## Lovar at halda síni lyftir

Nýggjárslyfti fyri meg kann merkja so nógv. Spurningurin er m.a., hvørjum tú gevur eitt lyfti, hví og hvussu forpliktandi tað skal verða.

Fyri meg hava nýggjárslyftir ongan serligan týdning. Í einum stjórastarvið sum á SL gevur tað ikki nógva meining bara einaferð um árið at geva lyftir -

tað skulu leypandi gevast stór og smá lyftir og tey skulu so vítt gjørligt haldast. Hinvegin skulu ikki gevast lyftir, sum ein ikki kann halda.

Ofta hoyra vit, at lyftir verða givin til at koma sær burturúr onkrum trupulleikum ella viðskiftum, sum kunnu hava skaðilig ella óheppin áðrin áteg sjálvan ella onnur, sum standa tær nær. Talan er kanska um lyftir ein útsetur og bíðar við til ársenda og sum kanska bara er ein undanførsla fyriat nakað hendir álíkavæl.

Annars hoyrist ikki nógv um, at broytingar eru hendar við lívinum hjá fólki orsaka av nýggjárslyftum - so í veruleikanum skal nakað heilt annað til at fyri broyta vanar og annað, eitt nú hvat er sjálvt endamálið og síðan viljastyrki.

Í mínari verð sum stjóri handlar tað í størri mun um at seta sær mál, gera ársætlanir, ársfíggjaræltanir og á henda hátt geva lyftir av øllum møguligum slag, sum forplikta uppá ymsar mátar. Tað verður ov drúgvt at nevna, hvørji lyftir talan kann verða um at geva á SL, men eg kann siga, at talan er um nógvar spennandi stórar og smærri uppgávur, sum vit fara at seta okkum fyri at loysa komandi ár, eitt nú at gera eina strategiska útbúgvingarætlan fyri øll starvsfólkini, skipabyggingar o.a.

**Jóannes Eidesgaard,
tingmaður og formaður Javnaðarfloksins:**

## Lovar at vera meira positivur

Hóast Javnaðarflokkurin hevur verið sera virkin í andstøðu, og hóast vit framvegis eru í andstøðu, so vil tingmanningin leggja seg munandi meira eftir at marknaðarføra egnan politik, heldur enn bert at taka støðu til útspælini frá landsstýrinum.

Harumframt fari eg sum floksformaður at leggja meg eftir at fáa samstarvið við limafeløgini at virka betur, soleiðis at so nógv sum gjørligt fáa ávirkan á virkna politikkin.

Persónliga vil eg leggja meg eftir at vera meira positivur, tó uttan at missa kritiska partin burtur.

**Høgni Hoydal, varaløgmaður**

## Lovar ikki at lova ov nógv

Í komandi ári kann eg lova, at eg ikki sum politikari fari at lova gull og grønar skógir. Ongar patentloysnir og bíligar útgjaringar. Bert miðvíst arbeiði, sum kann geva betringar yvir longri tíðarskeið.

**Helena Dam á Neystabø
Landstýriskvinna Sjálvstýrisfloksins við almanna- og heilsumálum:**

## Lovar at savna heldur enn at spjaða

Við ábyrgd fyri bæði almanna- og heilsumálum og fyri helvtini av fíggjarlógini skal mítt nýggjaárslyfti fyrst og fremst vera, at skapa so nógva gleði, so stórt nøgdsemi og so rættvísar almennar skipanir sum yvirhøvur møguligt.

Á almannaøkinum eru stór framstig hend hesi seinastu árini, og serliga eru tað fólkapensjónistarnir, sum hava fingið ein hart tiltrongan framburð. Eitt av nýggjaárslyftum mínum skal vera, at í ár 2001 skal Løgtingið taka støðu til, hvussu vit tryggja føroyskum pensjonistum trygg og góð pensjónsviðurskifti í framtíðini.

Ein sjálvsagdur mannarættur er at hava ein góðan og virðiligan bústað, millum okkum eru tað nøkur, sum orsaka av einum og hvørjum breki, ikki sjálv eru før fyri at útvega sær ein tílíkan bústað. Í 2001 skal ein ætlan leggjast, sum tryggjar øllum borgarum við breki rætt til ein virðiligan bústað í framtíðini. 2001 verður eitt avgerðandi ár fyri framtíðarstøðu Føroya. Fólkið skal taka støðu til eina miðvísa sjálvstýristilgongd, og vit skulu semjast um at taka ábyrgd av egnum landi. Mítt nýggjaárslyfti er at savna heldur enn at spjaða, at menna samanhald heldur enn sundurlyndi, og at tryggja at ein stórur meiriluti stendur aftanfyri avgerðirnar.

Mít nýggjaárslyfti og ynski skal tí vera, at tryggja, at tann sjálvstýristilgongd, sum fólkið skal taka støðu til í vár, er so haldgóð, so trygg og so sannførandi, at ein stórur meiriluti av Føroya fólki tekur undir við henni.

Vit áttu í felag at givið hvørjum øðrum ta nýggjárslyfti, at tað skal verða stuttligari, betri og ein størri avbjóðing at vera føroyingur í framtíðini.



# Sig sigar

**Nýggjársaftan er sigarkvøld hjá heilt nógvum – einasta sigarkvøld á árinum hjá nokkso nógvum. Men hvat er ein góð sigar og hvussu skal hon roykjast? Vit hava keypt eina sigar í einasta rættiliga sigarhandlinum í Føroyum, handlinum hjá Thorstein Arge á Kongrabrúnni í Havn**



*– Føroyska veðurlagið passar fínt til sigarir. Tær skulu goymast har luftvætan er um 70% og tí hava tær nógv betur av at vera goymdar í einum føroyskum hjalli enn í einari heitari stovu, sigur Thorstein Arge, sigarseljari á Kongabrúnni*

*Mynd: Jens K. Vang*

NÝGGJÁRSROYKUR

*Rúnar Reistrup*

– Ja, hvat kann man hjálpa hesum báðum flottu damunum við?

Spyr djúpmælti maðurin handan diskin, og tær báðar eldru kvinnurnar fremst í køini seta orðini í hálsin tvær ferðir, áðrenn onnur spyr eftir einum av teimum dýraru tendrarunum, sum liggja í handilsdiskinum.

Hann er blíður og tíður, Thorstein Arge, og til tíðir eitt sindur speiskur sum hann stendur har aftan fyri diskin í gamla handlinum hjá Oscar Arge. Handilin keypti hann í 1988 frá pápabeiggjanum, sum stovnaði hann á ólavsøku í 1938.

Síðan tá hava hvørki handilsnavnið, staðið ella útsjóndin broytt seg.

– Eg skal hava eina sigar, sigi eg, sum eri næstur, og seinastur, í køini.

Nú eru vit á heimavøllinum hjá handilsmanninum.

Á vegginum aftan fyri diskin standa stórir sigarkassar á ovaru hillunum. Á miðaru hillunum smærri sigarpakkar, seruttir og sigarillir, og á niðastu hillunum sigarettir.

Men Thorstein Arge kemur út um diskin, og opnar hurðina til eitt træskáp, sum í veruleikanum er ein heimagjørd humidor, tí tað er her hjartabørnini liggja.

### Kubanar eru ov dýrir

– Eg havi tíverri ongar kubanskar, tí tað vísir seg at tær eru eitt vet ov dýrar til kundagrundarlagið her í Føroyum. Eg sleppi ikki av við tær. Men tær dominikansku standa nú ikki nógv aftanfyri, og tær havi eg, sigur handilsmaðurin.

Hóast tímalønirnar hjá kubansku sigarrullarunum neyvan teljast millum tær hægstu, so eru kubansku sigarirnar nógv tær dýrastu. At tær eisini eru tær bestu ger, at tær hava sama pláss millum sigarnjótarar, sum Bordeux vínini hava millum vínkennarar.

Men Kuba hevur ikki einkarætt upp á vælsmakkandi royk. Tann Dominikanska Republikkin hevur verið sigarframleiðari alla farnu øld, og sigarirnar haðani hava sera gott orð á sær.

**»Hatta við at bíta endan av sigarini er nakað sum cowboyar gera. Ikki nakað man sjálvur skal gera, tí tað oyðileggur oftast dekkblaðið og so er sigarin klár at blaka vekk«**

Eftir kubansku kollveltingina rýmdi ein stórur partur av sigarframleiðarunum á Kuba til grannalondini – teir flestu til Dominikansku Republikkina – og hetta sást sjótt aftur á dominikansku sigarunum.

So tað er ikki av tilvid at fremstu hjartabørnini í humidorini hjá handilsmanninum á Kongrabrúnni koma frá Dominikansku Republikkini. La Corona eita sigarnirnar, og kosta hálvfjers krónur stykki.

– Hesar selji eg nógvar av. Og tá eg lati handilin aftur í morgin klokkan tvey fyri seinastu ferð hetta árið, verður tað ein kassi av hesum eg taki heim við til nýggjárshaldið, sigur Thorstein.

Kassin kostar 1450 krónur.

### Sigarir eru blivanar populerar

Hendan tíðin beint áðrenn gamlaárskvøld er besta sølutíðin fyri sigarir. Men sølan er nú slett ikki so vánalig restina av árinum heldur.

– Sigarsølan kring allan heim minkaði støðugt í nógv harrans ár, til vend byrjaði at koma í einaferð fyrst í hálvfemsunum. Tá byrjaði sølan at batna í USA, og hendan gongdin hevur breitt seg til Europa og síðstu árini eisini her upp til Føroya. Tað er blivið populert at roykja sigar aftur, og tað merkist væl, sigur Thorstein Arge.

Hansara viðskiftafólk eru úr øllum aldursbólkum, og eisini nógvir yngri føroyingar hava fingið smakk fyri ti, sum sigarin hevur at bjóða.

*Hvussu skal ein sigar roykjast?*

– Tað fyrsta ein má gera er at fáa hol í endan. Har hevur man sigarsaksar og sigarguillotinir at taka til, men eg plagi at gera soleiðis, sigur Thorstein Arge og festir í ein svávulpinn, letur hann brenna eitt sindur, og skavar síðan øskuna av honum. Síðan stingur hann varliga eitt hol í endan á sigarini við tí nú spíska endanum á svávulpinninum.

– Hatta við at bíta endan av sigarini er nakað sum cowboyar gera. Ikki nakað man sjálvur skal gera, tí tað oyðileggur oftast dekkblaðið og so er sigarin klár at blaka vekk. Eitt lítið hol gevur ivaleysa góðan trekk ígjøgnum sigarina, sigur Thorstein og tendrar sigarina við einum svávulpinni.

– Fyrr segði man altíð, at ein sigar ikki mátti tendrast við tendrara. Men gasstendrararnir hava so reina flammu, at teir kann man eisini gott brúka. Men ein bensintendrara má man endiliga ikki brúka.

*Hvussu leingi tekur tað at roykja eina góða sigar?*

– Leingi. Tað ræður um at hava góða tíð og roykja sigarina soleiðis, at hon bara akkurát klárar at halda glóðini. Hetta er ikki hastverk, sigur Thorstein og bjóðar næsta kundanum vælkomnum.